# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/01 - 27. Januar 2021 16:00-18:00

### Skrá:

1. Ferð um skúlan RMA vísir runt. Høvið verður at seta spurningar so hvørt.
2. Stýrið skipar seg – foreldraumboðini leggja fram uppskot
3. Ynski og væntanir fyri setuna
4. Ymiskt
5. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

Møtt: Regin, Súna, Birgir, Sjúrður, Derhard, Erla & Snorri
Forfall: Eingin

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
Rundferð har greitt verður frá deildarbygnaði og prinsippum í nýtsluni. Greitt verður eisini frá listini og hugsanini aftanfyri hví alt sær út sum tað ger og hvat hetta merkir fyri gerandisdagin.
Skúlastýrið er nøgt við skúlan, sum hann tekur seg út og ætlanirnar fyri hvussu leiðslan ætlar at nýta byrgningin.

Ad.2
Foreldraumboðini skjóta uppDerhard sum forfólk og Erlu varaforfólk. Einmætl samtykt

Ad.3.
Foreldraumboðini ynskja at arbeiða við hesum málum næstu 4 árini:

**Kantina**, ið skal servera heintan mat og kunna virka innanfryri karmar, ið skúlin og kommunan í felag seta. Foreldraumboðini skjóta um at leiðslan heitir á kommununa um at seta ein bólk, mannaður av umboðum fyri skúlan, skúlastýrið, kommununa og frítíðarskúlan at koma við tilmæli.
Mett verður, at hetta verður eitt stórt mál næstu mánaðirnar og árini. Samt skúlastýrið ynskir at nýta tíð til tað og at raðfesta málið.

Skúlastýrið ynskir at nýta orku upp á at orða ætlanir og politikkir, so at **rørsla** verður náttúrliga flætta inn í virksemi skúlans. Uppskot til leist fyri arbeiðið kann gerast á næsta fundi. Heitt verður tí á formannin at seta hetta á skrá til næsta fund.

Skúlastýrið ynskir eisini at arbeiða við skipanini av undirvísingini og skipanini av skúlanum, so at **undirvísing er fyri øll**. Herundir skipanir sum lofta vit teimum, ið kunnu detta niðurímillum.

Skúlastýrið ynskir, at eitt **tøkniligt baksýni** eisini kemur í nýggja faldaran um tøkni í skúlanum á fløtum við tíðarlinju aftur og frameftir. Skúlastýrið heitir á starvsfólkaumboðið í skúlastýrinum at lofta hesum og koma við uppskoti til søguligt baksýni saman  við leiðsluni.

Kommunusyrisumboðini ynskja at **leiðreglur fyri upptøku** á ítróttarrás, forskúla og 1. fl verður eftirmett. Serliga tí at fleiri ynskja at ganga í Skúlanum á Fløtum enn rúm er fyri. Tískil eigur kommunan saman við skúlaleiðsluni at eftirmeta og møguliga dagføra verandi leiðreglur har hetta er gjørligt. Har hetta ikki er gjørligt ynskja kommunustýrisumboðini, at heitt verður á kommununa um at eftirmeta og møguliga dagføra sínar leiðreglur.

Skúlastýrið ynskir eisiniat kommunan **eftirmetir ferðsluna** og trygdarviðurskifti kring skúlan. Skúlastýrið ynskir, at kommunan ger eina frágreiðing um ferðsluviðurskifti kring skúlan í løtuni í mun til hvussu mett var um somu viðurskifti undan at skúln lat upp.

Ad.4
Einki mál. Fallið innundir pkt 3

Ad.5
Næsti fundur ásettur at verða 18/2 – 16:00-17:30.
Regin kallar inn.
Derhard ger skrá innan 13/2

Fundur lokin kl 18:00

Regin Marnersson, skrivari
Derhard Jógvansson, forfólk